# Romantiskt klaverkvøld

**Russiska Nina Kavtaradze fer hóskvøldið at framføra romantiskan klavertónleik í Norðurlandahúsinum**

TÍÐINDASKRIV

Fyrsta Orfeus konsertin í vetur verður í Klingruni í Norðurlandahúsinum hóskvøldið 9. oktober kl. 20:00. Tá fer russiski klaverleikarin Nina Kavtaradze at framføra klavertónleik úr romantiska tíðarskeiðinum. Hálvan tíma undan konsertini, klokkan 19:30, fer Jóhannes Andreasen at greiða frá um tað, sum framført verður á hesi fyrstu Orfeus konsertini.

## Nina Kavtaradze

Nina Kavtaradze er fødd í Moskva. 6 ára gomul fór hon undir musikalsku útbúgving sína á sokallaða sentrala musikkskúlanum, sum er knýttur at konservatoriinum í Moskva, og sum varð stovnaður í 1932 og er ætlaður serliga gávuríkum børnum. Longu 8 ára gomul spældi hon á konsert í súluhøll samveldis-húsins. Eftir 11 ár á musikkskúlanum fór hon at lesa á sjálvum konservatoriinum, har hon var næmingur hjá víðagitna klaverleikaranum og læraranum Lev Oborin.

Eftir útbúgving sína helt Nina Kavtaradze fram við listarliga virksemi sínum í fyrrverandi Sovjett-samveldinum, USA og í mongum evropeiskum londum. Hon hevur einar 50 klaverkonsertir tøkar á skránni hjá sær. Hon hevur m.a. starvast saman við so frægum dirigentum sum Jurij Ahronovich, Sir Charles Groves, Leif Segerstam, Jorma Panula, Kurt Sanderling, Moshe Atzman og Mariss Jansons.

Harumframt hevur hon spælt á altjóða festivalum og kamartónleik saman við Jean-Pierre Rampal, Felix Ayo, Victor Pikaizen og fleiri. Síðan 1986 hava Nina Kavtaradze og selloleikarin Erling Bløndal Bengtsson myndað eina duo, sum spælir um allan heimin.

Verkskrá hennara fevnir um øll tónlistarsøgulig tíðarskeið. Stundum hevur hon verk á skránni, sum mestsum ikki verða framførd annars. Sum dømi hevur hon tikið upp til fløgur allan klavertónleikin eftir Richard Wagner og eftir Modest Musorgsky. Fløguupptøka hennara av klaververkum Wagners varð í tíðarritinum "Neue Musikzeitschrift" (sum Robert Schumann stovnaði á sinni) kosin at vera millum tíggju tær bestu klaverútgávurnar í heiminum í 2000.

## Næsta Orfeus konsertin

Næsta konsertin í Orfeus røðini verður hóskvøldið 30. oktober 2003, kl.20.00. Tá fara Nikolaos Kapnas og Stamen Stantchev at spæla verk fyri violin og klaver eftir Debussy, Stravinsky og Saint-Saens.



*Russiska Nina Kavtaradze hevur vitjað í Føroyum áður, tá hon spældi klaverkonsertina eftir Grieg saman við Føroya Symfoniorkestri. Hóskvøldið er hon í Norðurlandahúsinum*






## Tøkk

Ein hjartalig tøkk til tykkum øll, ið vístu samkenslu, tá pápi og bróðir okkara

**Jaspur U. Klakkstein**
**Klaksvík**

doyði og varð jarðaður. Takk fyri blómur, kransar og alla ta hjálp, ið varð veitt okkum.
Tøkk til øll, ið fylgdi Jaspur til hansara síðsta hvíldarstað.

**Bina, Richard og Hanna**


**Sosialurin**
– hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo





